# Fleiri sáttmálar ganga út í næstum

**Tann 1. mars ganga allir tríggir sáttmálarnir, ið Reiðarafelagið fyri Farmaskip hevur við manningarfeløgini, út**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Talan er um sáttmálarnar við Føroya Skipara- og navigatørfelag fyri yvirmenn á brúnni, sáttmálar við maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar og sáttmálar við sjómannadeildina hjá Føroya Fiskimannafelag fyri dekkarar. Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum stendur at lesa, at allir tríggir sáttmálarnir ganga út 1. mars, men enn eru samráðingar um nýggjar sáttmálar ikki byrjaðar.




*Um ein góðan mánað, tann 1. mars, ganga sáttmálarnir, ið Reiðarafelagið fyri Farmaskip hevur við manningarfeløgini, út.*
*savnsmynd*

Ein annar sáttmáli, ið eisini gongur út 1. mars. Tað er sáttmálin millum Arbeiðsgevarafelagið og Starvsmannafelagið um starvsfólk á Føroya Tele. Her eru samráðingar tó byrjaðar um nýggjan sáttmála, og tveir fundir hava longu verið, skrivar Vinnuhúsið á heimasíðuni.

# Fleiri vilja vera »Sluppvinir«

**Nú ber til hjá fólki, sum hava hug og tíð til at verða um og sigla við gomlu sluppini Westward Ho, at tekna seg sum „sluppvin".**

WESTWARD HO
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tey fólk, sum tekna seg sum „sluppvin", fáa møguleika at virka umborð á sluppini innan eitt øki, ið tey hava serligan førleika til ella serligan áhuga fyri.

### Samvera eisini stóran týdning

Fólkini, ið varða av gomlu sluppini, siga, at sluppvinirnir gera nógv ymiskt umborð. Siglingarvirksemi er býtt upp í tríggjar tættir. Tað eru navigatión, dekk og rigningur og so maskina og tøkni. Hvørt av hesum økjum hevur síðani ein samskipara, ið leiðir og skipar sítt øki og tey fólk, sum taka lut í júst tí partinum.

Á henda hátt verður roynt at fáa fleiri fólk at taka sær av gomlu sluppini, og samstundis verður eisini roynt, at fólk skulu fáa størri kunnleika til skipið og førleika til at fara um skipið.

Tey, ið hava áhuga fyri at gerast „sluppvinir", kunnu tekna seg á heimasíðuni hjá sluppuni, www.westwardho.fo.



*Tað var ein hátíðarlig løta, tá ið Westward Ho í fjør summar kom aftur á Havnina, eftir hon í drúgt tíðarskeið hevur verið til stóra umvæling í Skotlandi*
*savnsmynd*

# Poppkorn ovast á sølulistanum

**Poppkorn fløgan er kropin heilt ovast á listan yvir mest seldu fløgur hjá 3'aranum. Tilsamans eru seks føroyskar fløgur millum 10 tær ovastu. , millum hesar eru fleiri fløgur, ið ikki megnaðu at koma inn á listan í jólasøluni.**

FLØGUSØLA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Poppkorn eru gjøgnumførdur vælframleiddur føroyskur poppur*

Listin hevur ikki verið virkin seinastu vikurnar, men seinasti listin í 2005 hevði fløguna Popplist 4 á ovastu rók, har hevði hendan fløga ligið í fleiri mánaðar, hesa vikuna er Popplist 4 dottin niður á triðja pláss. Sambært umboðsmanninum hjá Poppkorn Eyðfinn Jensen hevur Poppkorn selt umleið 2800 eintøk av fløguni, og við ovasta plássi á sølulistanum eru tey 3000 eintøkini, ið vórðu gjørd av fyrstan tíð, skjótt útseld. Poppkorn eru í uppskoti til planetina fyri besta nýggja á Planet Awards 28. januar.

### Planet fløgur koma inn aftur

Tvær av fløgunum, ið eru í uppskoti til planetina fyri bestu fløgu, eru komnar inn á listan hesa vikuna. Talan er um Førist hjá Páll Finnur Páll og Morning Dew hjá Høgna Lisberg, ið liggja á áttanda og níggjunda plássi.

Báðar fløgur vóru á listanum tá tær komu út, Høgni Lisberg var bert tí einu vikuna á listanum, meðan Páll Finnur Páll vóru fleiri vikur innið onkra av vikunum ovast.

### Kim og Dynamit enn við

Kim Hansen, ið er í uppskoti til planetina fyri besta sangara, og hansara savnsfløga Alt, liggur aftur hesa vikuna ovaliga á listanum, hesa vikuna á sætta plássi. Ein onnur savnsfløga tann hjá Dynamit hevur eisini verið trúgv á listanum, síðan hon kom út. Hesa vikuna er hon á fimta plássi.

### Eingin listi uttan Now

Sum vant er ein Now fløga millum best seljandi útlendsku fløgurnar. Hesa vikuna er tað Now 14, ið er á øðrum plássi. Savnsfløgan hjá Eminem Curtain Call er á fjórða plássi, meðan System Of A Down og Korn umboða harða rokkin á 7. og 10. plássi

# Kendur búnýtishandil letur upp í Havn

**Flestu konufólk í Føroyum kenna ivaleyst handilsketuna Inspiration, sum hevur deildir í so at siga øllum størri býum í Danmark. Nú verður so eisini latið upp í Havn**

BÚNÝTISHANDIL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ivaleyst hava nógvir føroyingar, og kanska serliga konufólkini, vitja í onkrum av hesum handlum, tá ið tey hava verið á vitjan í Danmark. Í løtuni verður lýst í bløðunum eftir dagligum leiðara til handilin.

### Lutfalsliga stórur handil

Nýggi búnýtishandilin letur upp í nýggja bygninginum, Miðlon, sum í løtuni verður bygdur á Hálsi við síðuna av bakaríinum hjá Gunnleivi. Umframt deildina hjá Inspiration fer eisini Elgiganten at hava deild í bygninginum.

– Eg dugi ikki enn at siga, nær vit fara lata upp. Vit fara at lata upp, so skjótt bygningurin verður liðugur, men nær tað verður, dugi eg ikki at siga. Væntandi verður tað tó umleið um mánaðarskiftið mars/april, sigur Majbritt E. Winther, ið hevur tikið stig til nýggja handilin.

Hon heldur, at tað er tørvur á einum slíkum handli í høvuðsstaðnum, og er hon ógvuliga spent uppá, at handilin letur upp. Spurd, hvussu stórur handilin í Miðlon verður, sigur Majbritt E. Winther:

– Tað haldi eg ikki, at eg fari at avdúka enn, men eg kann siga so mikið, at talan er um ein lutfalsliga rættuliga stóran handil, sigur hon.

Inspiration hevur umleið hálvthundrað deildir í Danmark, og harafturat er eisini ein deild í grønlendska høvuðsstaðnum Nuuk.